# Atlantsflog nýggja rutu til Ålborg

**Tað tekur umleið ein tíma at koyra í bussi úr Ålborg til Århus, ein tíma til Hirtshals og hálvan annan tíma úr Ålborg og norður til Skagen**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*



*Framleiðslustjórin greiðir frá ymisku brennivínssløgunum, sum Ålborg Akvavit hevur at bjóða*

Atlantsflog fer nú undir enn eina nýggja rutu, hesaferð millum Vágar og Ålborg í Norðurjútlandi. Flogið verður leygardagar, og byrjað verður leygardagin, 25. juni.

Nógvir føroyingar búgva í Norðurjútlandi, eitt nú í Hirtshals og Skagen, og nógvir føroyingar lesa í Århus.

Nýggja farleiðin er soleiðis ein nýggjur møguleiki hjá føroyingum í Danmark og familjum teirra í Føroyum at ferðast millum londini.

Hetta er eisini ein frálíkur ferðamøguleiki hjá føroyingum, sum kundu hugsað sær at hildið frí í Norðurjútlandi – eins og hetta er ein nýggjur møguleiki hjá dønum at vitja í Føroyum.

Nógv áhugavert er eisini at síggja í Ålborg, har stívliga 160.000 fólk búgva.

Tað tekur umleið ein tíma at koyra í bussi úr Ålborg til Århus, ein tíma til Hirtshals og hálvan annan tíma úr Ålborg og norður til Skagen.

## Nógv vitjandi

Ferðaskrivstovur í Norðurjútlandi marknaðarføra hendan partin av landinum undir heitinum – "fra midten og op". Tað merkir, at tær serliga leggja seg eftir at vísa á tey ferðamál, sum eru frá Miðjútlandi og norðureftir.

- Tað er ikki av tilvild, at fleiri hundraðtúsund danir, norðmenn, sviar og týskarar á hvørjum ári velja at halda frí í Jútlandi – "fra midten og op", sum ferðaskrivstovur í Norðurjútlandi rópa tað.

Skrivstovurnar leggja aftrat, at her fært tú høvi at uppliva víddirnar, har stundir eru at vera saman og njóta lívið.

- Her er høvið at uppliva mangt og hvat – heilt frá Skagen í norði til Gjern í suðri og frá Agger í vestri til Grenå í eystri. Tú kanst uppliva náttúruna, vitja mentunarlig og søgulig støð, djóralív, upplivingar av ymiskum slagi, matstovur, ríkt handilslív og náttarlív.

## Vitjan í Ålborg

Í samband við, at Atlantsflog fer undir hesa nýggju farleið, bjóðaði felagið í samstarvi við ferðavinnuna í Ålborg føroyskum bløðum og ferðaskrivstovum á eina vitjan í Ålborg.

Vit fóru úr Vágum niður til Billund klokkan 11 seinasta hósdag, gistu tvær nætur á Helnan Phønix Hotel í Ålborg og vóru aftur í Vágum leygardagin um 16-tíðina.

Í Ålborg tóku ferðavinnufólkini, Anne-Marie Jensen og Peter Hermansen, sær væl og virðiliga av okkum og vístu okkum áhugaverd støð í býnum, sum kunnu hugsast av hava áhuga fyri føroyingar.

Sera fryntligu Anne-Marie og Peter spardu ikki sína orku. Ei heldur kann sigast, at Ålborg kommuna spardi upp á nakað sum helst, meðan vit vóru á vitjan.

Vit búðu á góðum hotelli og ótu á góðum matstovum í býnum. Okkum nýttist hvørki at hugsa um flutning ella atgongumerki, tá ið vit vitjaðu søvn, djóragarð - ella Ålborg Akvavit!

Áhugaverdi túrurin í stuttleikabáti á Limfjørðinum, har vit vórðu vartaði upp við góðum pinnamati og onkrum leskandi, kostaði okkum heldur ikki eina krónu.

## Frásagnir

Sosialurin fer í komandi bløðum at hava nakrar frásagnir frá hesi ferðini, har vit fara at lýsa ein part av tí, sum Ålborg hevur at bjóða ferðafólki.

Atlantsflog og ferðavinnan í Ålborg eiga tøkk fyri hesa uppliving – og tey, sum vóru við úr Føroyum, eiga tøkk fyri gott ferðalag.



*Hugtakandi ísbjarnir í áhugaverda djóragarðinum í Ålborg*



*Regnskjólini komu væl við hjá Dánjali og Olivuri, tá ið vit vitjaðu sjósavnið. Aftanfyri teir báðar sæst "strandaði" kavbáturin*



*Tær fýra kvinnurnar, sum vóru við í ferðini; Maria & Maria frá Atlantsflogi, Marita frá Flogfelag Føroya og Karis, sum starvast á Vikublaðnum*